**Røða hjá Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu, í samband við aðalfund í Føroya kommunufelag 19. februar 2011**

Fyrst vil eg takka fyri, at eg eri boðin við her í dag og at eg havi fingið høvið at siga nøkur orð.

Tað er av stórum týdningi við góðum samskifti og samstarvi millum okkum landspolitikkarar og tykkum, ið umboða kommunurnar.

Eg havi sjálv sitið tykkara megin borðið í samráðingum, so eg veit at viðhvørt kunnu bylgjurnar ganga harðliga, men tíbetur verða semjur gjørdar í flest øllum førum.

Partarnir eru ikki altíð samdir, men vit hava eitt felags endamál – nevniliga føroyski borgarin. Tí kýta vit okkum at samstarva og finna loysnir, borgaranum at frama.

Føroysk lóggáva er fløkt. Hetta kunnu flestøll skriva undir uppá. Og tað merki eg hvønn einasta dag og tað gera tit nokk eisini. Eitt er, at okkum mangla lóggávu á forsorgarøkinum, sum tryggjar borgaranum rættindir.
Haraftrat gevur galdandi lóggáva á bæði eldraøkinum og barnaverndarøkinum okkum høvuðbrýggj næstan hvønn einasta dag. Á hesum økjum er tað serliga ógreiða uppgávu- og ábyrgdarbýtið, sum eru trupulleikin.

Sum eg havi sagt onkustaðni fyrr , so segði ein tíðindamaður einaferð við meg, tað var at skýrt at vera ein vavgreytur.

Eg vil ikki fara so langt, men tað er av avgerandi týdningi, at vit fáa greitt fløkjurnar.

Men fortreytin fyri at fáa neyðuga gjøgnumskygni og veita eina rættvísa tænastu er at rudda verður í ábyrgdar- uppgávubýtinum millum land og kommunur. Og at politisk støða verður tikin sum skjótast, um nær og hvat øki skal leggjast út til kommunurnar at umsita ella ikki.

------

Kommunubólkurin handaði landsstýriskvinnuni í innlendismálum álit um eina framtíðar kommunuskipan. Talan er um ein veldigan reform á økinum.

Broytingarnar, ið samgongan arbeiðir við á kommunuøkinum kunnu veruliga rópast ein reformur. Í politiska kommunubólkinum, eru vit við at blíva samd um ein leist, sum nú skal tyggjast í samgonguflokkunum.

Talan er um ein samlaðan pakka, sum umfatar tal av eindum av kommunum ella økjum , hvørji øki skulu leggjast út og nær og fígging.

Samstundis, sum nýggju eindirnar vera skipaðar, verður eldraøkið sum tað fyrsta økið, lagt út til kommunurnar at umsita.

Nýggi bygnaðurin leggur upp til at kommunurnar fáa fleiri uppgávur, men eg ivist onga løtu í, at nýggju eindirnar megna at átaka sær hesa ábyrgd.

Fundur verður í politiska fylgibólkinum og kommunufeløgini týsdagin í komandi viku, og eg vóni at vit fáa eina útmelding, um hvar kommunufeløgini standa.

Eg havi ongantíð krógvað, at eg haldi at UM kommunurnar, skulu leggja saman, so eiga tær at fáa fleiri og størri uppgávur at umsita. Bara at leggja kommunur saman og einki fylgir við, eggjar ikki kommunurnar til samanlegging.

Eg vil tí gera mítt besta, saman við kommununum, at fyrireika eldraøkið til yvirtøku. Tað skal gerast ein rammulóg (eldralóg), sum skal tryggja borgaran.

Kommunurnar skulu heilt greitt verða við at mynda ein komandi eldra politikk.

Í løtuni verður arbeitt, har tað ber til, við at samskipa eldraøki í tey 6 økini, sum eru í dag, eftir sama leisti sum í Sandoynni, men tað verður eisini tikið hædd fyri at tað kunnu gerast broytingar. Tað eru tó fleiri avbjóðingar á vegnum, sum hædd má takast fyri. Verður talan um fleiri eindir, enn tær 6 sum eru í dag, má eisini takast hædd fyri hesum, ella um møguleiki er til samstarv, um kommunuøkir.

Tað vil siga, við einari visitatión og upptøkunevnd í hvørjum øki, soleiðis, at tað er økisleiðarin sum hevur ábyrgdina av øllum, sum hava tørv á røkt, um tað er búpláss, heilsutænastu, heimahjálp, mattænastu ella vardum dagtilboði.

Yvirskipað tryggjar hetta, at skipanin verður einføld og gjøgnumskygd. Fyri okkara eldru skal tað merkja eina skjóta og góða avgreiðslu, har tað verður ein og sama hurð inn í eldrarøktina í økinum, til borgaran at frama.

**Tað er neyðugt** at hava eina upptøkunevnd fyri hvørt økið, sjálvt um samskipanin av heimahjálp/heimasjúkrasystrum út frá heiminum ikki verður gjøgnumført beinanvegin á øllum heimum.

Hetta fyri at fáa ein so skynsaman rakstur av eldraøkinum, sum gjørligt og ikki minst at tryggja at tað er tørvurin hjá tí einstaka, sum er avgerandi fyri um ein fær búpláss ella um heimahjálp kann hjálpa uppá støðuna, fyri at kunna verða heima, sum longst í egnum heimi.

Hoyringsfundur var í samband við broyting innan eldraøkið, har kommunufeløgini, stýrið, økisleiðarar, stovnsleiðarar vóru umboðað. Heilt greiði boðskapurin hjá kommunufeløginum var at tað er alneyðugt at rudda upp í uppgávu og ábyrgdabýtinum millum land og kommunur ongantíð ov skjótt. Hetta er eisini eitt standard svar frá feløgunum í øllum hoyrings svarum sum koma inn.

Beint nú verður arbeitt við, at fáa greitt nakrar fløkjur, fyri at fáa skipað eldrarøktina so einfalda, skynsamt og trygt, so økið verður búgvið at lata kommunum at umsita og menna.

Men hetta geri eg ikki einsamøll. Tað er bert í einum tøttum samstarvi við tykkum, at hetta fer at bera til. So skjótt sum politiska kósin verður endaliga meldað út, fari eg at heita á tykkum í kommunufeløgunum um samstarv.

Í felag gera vit eina neyva ætlan fyri hvussu eldraøkið skal leggjast út.

Haldi sjálv, at samstarvið sum var millum Almannamálaráðið og kommunurnar í samband við Kommunuálitið var fyrimyndarligt. Vónin er, at vit kunnu taka tráðin upp og byggja víðari á hetta arbeiðið.

Tað vísir seg ofta at tá byrja verður uppá at gera broytingar, eru fleiri ting sum koma til sjóndar, sum ger tað trupult at gjøgnumføra. Sum dømi kann nevnast, at vit komu eftir, at lógin forðaði fyri at heimahjálpin kundi arbeiða inni og út frá einum røktarheimi. Og tískil kundi heldur ikki veitast náttarvakt út frá einum røktarheimi til privat heim. Hesin trupulleikin er nú loystur, men tað eru framvegis broytingar sum skulu gerast fyri at kunna gera eina upptøkunevnd fyri hvørt økið.

Nakrir avbjóðingar/trupulleikar sum nevnast kunnu, eru:

Lógarverkið (eldralóg) fæst ikki uppá pláss, so leingi fleiri myndugleikar eru inni í myndini.

Tilboðini verða ikki dagførd, vald og gjald fylgjast ikki, trupult at stýra og at rationalisera

Ymiskt tænastustøði sum nú er, sum er ein trupulleiki so leingi landið hevur ábyrgdina av eldrarøktini.

Visitatiónin er trupul so leingi kommunur eiga bygningar og landið rindar rakstur

Umframt trupulleikan við land/kommunu er eisini trupult at handfara land/kommunur og sjálvsognarstovnar.

Hetta er dømi uppá hvussu trupult tað er at gera broytingar. Tí má útleggingin fyrireikast væl.

Men eg havi góða vónir.

Men fyrst so má avgerðin takast:

Manglandi avgerð ger, at tað er sera trupult at gera nakað við eldrarøktina tí bæði landsmynduleikar, sjálvsognarstovnar og kommunalir bíða eftir avgerðini.

Hvussu verður so tilgongdin.

Embætismannabólkur verður mannaður av Almannamálaráðnum, Føroya Kommunufelag, Kommunu Samskipan Føroya og Nærverkinum, sum má fyrireika útleggingina av eldrarøktini. Politiskur stýris/fylgibólkur setast.

Rammulóg má gerast áðrenn økið verður lagt út.

Greiðast má fáast á hvussu kommunala umsitingin av eldrarøktini skal skipast.

-----

Bæði kommunufeløgini hava áður boða frá, at tey eru sinnaði til at yvirtaka økið, um semja annars fæst um treytirnar fyri yvirtøkini, her undir fíggingini.

.

Um eg skal taka samanum her at enda, so vil eg siga, at eg havi eina grundaða trúgv uppá, at fløkta uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur, fer at gerast nógv greiðari nú.

Nógv fyrireikandi arbeiði er gjørt, sum staðfestir, at tingini eru fløkt. Upprit og álit eru skrivaði og tilmælir eru løgd fram.

Tað sum tørvur er á nú, er at vit politiskt taka eina støðu, um hvussu vit velja at loysa fløkjurnar. Vit í politiska kommunubólkinum eru um at blíva samd um ein góðan og greiðan leist, og eg trúgvi uppá, at vit við hesari semju eru komin eitt fet nærri einari loysn.

Framhaldandi góðan aðalfund.

Enn einaferð Takk fyri!